## DAGSINS MEINING

# Ræðuleikar halda fram

Allur heimurin uttan undantak fordømir yvirgangsálopini í London. Úr øllum londum koma samhugafjarrit til tey avvarandi og myndugleikarnar í Bretlandi, eftir at fýra bumbur í vikuni gjørdu av við meira enn 50 ósek menniskju og særdu fleiri hundrað. Eisini úr Føroyum verður samhugi vístur teimum, sum mist hava. Tórshavn hevur sent borgarstjóranum í London samhugafjarrit undirskrivað av borgarstjóranum her.

Bumbuálopini í London eru bert enn enn ein ræðuhending í røðini av yvirgangi eftir 11. september í New York. Ár herfyri raktu bumbur ósek í spanska høvuðsstaðnum. Nú kom so túrurin til London. Og óttin breiðir seg. Spurt verður hvar yvirgangsfólkini fara at gera um seg næstu ferð. Onkur vil vera við, at Danmark, sum eins og Spania og Bretland hava verið partur av hermegini í Irak, nú eigur tørn. Og sum partur av danska kongaríkinum eiga heldur ikki vit í Føroyum at kenna okkum trygg. Spurningurin er tí, um okkara myndugleikar eins og teir donsku eru á varðhaldi?

Hesin afturvendandi yvirgangurin fer fram júst um sama mundið, sum liðin eru 10 ár síðani ræðuligu hendingina í Srebrenica í Bosnia, tá blóðtystir og hevndarhugaðir serbar tóku til fanga fleiri enn 7000 muslimskar dreingir og menn og tóku teir av døgum. Henda ræðuhending fer at eiga pláss í framtíðar søgubókum sum nakað av tí mest ræðuliga, sum mannahendur hava framt, síðani seinna heimskríggj.

Hvat kunnu vit onnur gera, tá slíkt hendir verður spurt. Finna tey seku er svarið. Sjálvandi skulu tey seku finnast, tey seku frá hópdrápunum í Bosnia og tey seku frá yvirganginum í London 10 ár seinni. Men hetta er ikki nóg mikið. Vit mugu eisini í slíkari stund gera okkara til at byggja brýr millum øll menniskju, uttan mun til trúgv ella húðalit, landamørk ella politiskar fatanir. Tess fleiri menniskju víða um virka fyri friði og næstrakærleika tess torførari hava fundamentalistar og fanatikarar møguleikan at fáa fótafesti og undirtøku. Tey seku mugu standa til svars fyri gerðum sínum, men vit mugu gera alt fyri at minka um haturi, sum fylgir í kjalarvørrinum á slíkum misgerðum. Besta vápnið móti ekstremu yvirgangskroppunum er, at vit øll, kristin sum muslimar, buddistar sum hinduistar, standa saman sum ein maður. Tað yvirgangsfólkini ynskja er nettupp at seta kílar millum okkara og tey, sum teir halda vera teirra egnu. Uppgávan hjá okkum í Vesturheiminum og í øllum heiminum annars er at savna tey hóvligu móti teimum víðgongdu. Yvirgangsfólkini mugu ikki fáa sín vilja, sum er at skapa enn størri hatur og intoleransu millum eitt nú kristin og muslimar.

Tí krevur tað nógv av okkum øllum, at vit ikki leypa framav og taka lógina í egnar hendur og bara leggja upp til eina hevndaratsókn fyri og aðra eftir. Latið okkum heldur, kristin sum muslimar, hvít sum svørt, standa saman móti harðskapinum og yvirganginum. Men hetta krevur so aftur av okkum, at vit eru við til at loysa tær konfliktir og støður, sum eisini eru ein partur av orsøkini til yvirgangin. Eitt nú óhugnaliga fátækradømið í heiminum. Og her hugsa vit so serstakliga um eina friðaliga loysn á Miðeysturtrætuni millum ísraelar og palestinar. Her mugu hóvligu og menniskjanslígu kreftirnar í báðum leirum gera alt fyri at vinna á fundamentalistunum, sum jú finnast alla staðni.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# YVIRLÝSING

Undirritaðu fakfeløg mótmæla harðliga, at landsstýrismaðurin við fíggjarmálum hevur noktað at góðtikið eina semju, sum Maskinmeistarafelagið og Elfelagið SEV hava gjørt eftir uppskoti, sum varð lagt fram av semingsfólkunum.

Tað er átaluvert, at landsstýrismaðurin vrakar eitt av pørtunum góðtikið semingsuppskot, sum hevur til endamáls at javna lønina hjá maskinmeistarum, sum starvast hjá SEV við aðrar maskinmeistarar, ið starvast á landi, serliga tá vit kunnu staðfesta, at sambært viðmerkingunum til kommunu-stýrislógina so er endamálið við góð-kenningar-heimildini hjá landsstýrismanninum júst at "tryggja eitt javnt alment lønarlag"

Vit átala samstundis harðliga, at sitandi samgonga hevur longt verandi sáttmála í 5 mánaðar og harvið hevur forðað maskinmeistarunum, sum starvast hjá SEV, at fáa somu løn, sum aðrir starvsfelagar teirra, sum starvast á landi.

Vit vilja harðliga ávara ímóti, at politisku flokkarnir soleiðis leggja seg út í samráðingarættin og verkfalsrættin hjá føroysku fakfeløgunum og vit skulu minna á, at vanligi føroyski løntakarin neyvan fer at gloyma hesa ráðagerð, sum teir politikarar sum siga seg stuðla verkamannafjøldini, her hava framt móti føroysku fakfelagsrørsluni.

Vit lýsa tí við hesum okkara fulla stuðul til Maskinmeistarafelagið og limir tess, og heita á øll fak-feløg um at standa saman móti áganginum frá sitandi samgongu.

**Tórshavn, tann 08-07-2005**
**Føroya Pedagogfelag**
**Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar**
**Føroya Lærarafelag**
**Ergoterapeutfelagið**
**Fysioterapeutfelag Føroya**
**Bioanalytikarafelagið**

# Kallsberg spyr Espersen um løgreglu

TÍÐINDASKRIV
*Fólkaflokkurin*



Fólkafloksumboðið á Fólkatingi fer at reisa ein grein 20 spurning til Lene Espersen, justitsministara, til skrivligt svar í Fólkatinginum í morgin. Anfinn Kallsberg fer at seta danska løgmálaráðharranum hesar spurningar:

1. Er løgmálaráðharrin partur av avgerðini um at niðurprioritera politiið í Vágum og Vestmanna fyri í staðin at uppprioritera politiið í Tórshavn?

2. Hvat heldur løgmálaráðharrin um hesa avgerð?

3. Áttu føroyskir myndugleikar ikki at verið partur av hesi avgerð, áðrenn ein so prinsipiell støða verður tikin?

Í fjølmiðlunum verður boðað frá, at ætlanir eru at flyta tveir av sjey politistum í Vágum til Havnar, og at sýsluskrivstovan í Vestmanna verður latin aftur.

Anfinn Kallsberg er sannførdur um, at tað neyvan liggur nøkur sparing í hesum broytingum. Nú økt flúgving fer fram í Vágum, verður helst brúk fyri fleiri resursum á Flogvøllinum. Anfinn Kallsberg, fólkatingsmaður, er av tí fatan, at uppgávurnar verða best loystan so tætt at brúkaranum sum gjørligt, - og tað ger man ikki við at flyta úr politiið úr Vestmanna og partvíst úr Vágum og sentralisera politiið í Havn.

- Tað er avgjørt neyðugt, at føroyskir myndugleikar eiga at verða partur av støðutakanini í einum so prinsipiellum málið, sigur Anfinn Kallsberg.

# Suðuroyarleiðin má tryggjast móti verkfalli

VEGNA SAMFERÐSLUBÓLKIN
*Jacob Vestergaard, form.*



So hendi tað aftur. Smyril siglir ikki tí verkfall er lýst. Suðuroyggin liggur avskorin frá umheiminum hvat ferða- og farmaflutningi viðvíkur, til stóran skaða fyri vinnulívið og vanlig ferðafólk.

Hetta kunnu vit ikki framhaldandi liva við.

Samferðslubólkurin ásannar, at hóast trupuleikin hevur verið umrøddur av og á í fleiri ár, eru ongi ítøkilig stig tikin fyri at loysa málið, og tí verður Smyril lagdur hvørja fer verkfall er.

Tað er tí alneyðugt, at tað beinan vegin verða tikin stig til at loysa hetta, fyri Suðuroynna, so týdningarmykla mál.

Samferðslubólkurin hevur tí heitt á landsstýrismannin í fíggjarmálum um at taka málið upp við avvarandi yrkisfeløg, og finna eina loysn, sum allir partar kunnu liva við.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14:00


**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.